Kristian Martin og synir:

# Veiddu 100.000 tons í ár



*Nótabátarnir hjá Christiani í Grótinum eru farnir aftur á fiskileið fyri at fáa tey seinastu tonsini í hesum árinum, sum hevur hilnast væl hjá reiðarínum*

**Reiðaríið Christian í Grótinum er sum heild væl nøgt við hetta árið. Oljuprísurin hevur ikki tikið teir á bóli, tí teir høvdu roknað við høgum oljuprísum frammanundan, og fiskaprísurin hevur verið á góðari leið. Nótabátarnir hjá reiðarínum Christian í Grótinum og Norðborg hava tilsamans túsund tons eftir av sínari kvotu. Lagt varð frá bryggju annan jóladag fyri at fáa tey síðstu tonsini til høldar**

FISKISKAPUR
*Stefan í Skorini*

Palli Ziskason heldur, at sum heild hevur árið hilnast væl hjá reiðarínum.

Veiðan hjá báðum nótabátunum er seld fyri slakar 100 milliónir krónur.

Christian í Grótinum fekk góð 60.000 tons í ár, meðan Norðborg fekk 30-40.000 tons. Tað er tó torført at meta um veiðuna hjá Norðborg, tí fiskurin verður skorðin til flak umborð.

– Eftir umstøðunum eru vit nøgdir við hetta árið. Prísurin hevur ikki verið beinleiðis góður, men á góðari leið. Prísirnir eru uppgangandi, so tað sær ljóst út, sigur Palli Ziskason.

Christian í Grótinum hevur fingið góð 60.000 tons í ár. Harav eru 45.000 tons svartkjaftur, meðan restin er lodna, sild og makrelur.

Meginparturin av veiðuni hjá Norðborg er sild, meðan 10.000 tons eru fingin av svartkjafti, 4.000 tons av lodnu og nøkur fá tons av makreli.

### Oljuprísurin lítið hægri enn væntað

Nógvir reiðarar gremja seg óført um oljuprísirnar, sum eru methøgir, men Palli Ziskason sigur, at teir hava ikki verið nógv hægri enn væntað.

– Oljuprísurin hevur næstan verið sum vit væntaðu. Hann hevur verið lítið hægri enn vit projekteraðu við, sigur Palli.

Reiðaríið bunkraði olju í Føroyum fyri 2,8 krónur fyri liturin í oktober, men hesuferð bunkraðu tey fyri 1,9 krónur.

– Vit hava projekterað við einum oljuprísi uppá 2,1 krónur í miðal, sigur Palli.

Tilsamans hevur reiðaríið goldið 3 milliónir krónur meira enn væntað fyri olju í ár. 20 milliónir krónur verða brúktar til olju í ár. Tað er fyri eini 9 milliónir litrar av olju.

– Vit merkja tað tó, at oljuprísurin er farin upp, tað gera øll, men tað er ikki so langt við síðuna av tí, vit høvdu væntað, sigur Palli at enda.

### Royna eftir makreli

Annan jóladag løgdu Christian í Grótinum og Norðborg leiðina í ES-sjógv, har tey enn hava eini túsund tons eftir at fiska av kvotuni í ár, og roynt verður at fáa so nógv sum gjørligt áðrenn 1. januar. Báðir bátarnir royna eftir makreli vestanfyri Hetland og suður ímóti Skotlandi.

Norðborg verður kanska ikki at síggja aftur fyrr enn út ímóti sumri, tí skipið landar í Noregi, ella har prísurin er bestur, og manningin skiftir eisini har, ið landað verður. Um fiskiskapurin hinvegin verður ringur, so leggur tað kanska leiðina heimaftur í næsta mánaði. Christian í Grótinum skiftir manning í Føroyum og verður væntandi aftur í Føroyum seint í januar.

Nýggja saltgoymslan á Glyvrum:

# Fyrstu tonsini endiliga komin

**Nýggja saltgoymslan hjá Eimskip á Skálafjørðinum hevur nú fingið tey fyrstu tonsini av salti. Fríggjadagin kom eitt farmaskip úr Karibiska havinum við 2.600 tonsum og liðugt varð at lossa jólaaftansmorgun**

SALTGOYMSLA
*Stefan í Skorini*

Fríggjadagurin var ein stórur dagur hjá Eimskip og hjá fólki í Runavíkar kommunu. Endiliga varð fyrsta lastin av salti komin til nýggju saltgoymsluna, sum hevur staðið klár síðan oktober.

Hollendska skipið Ankergracht var komið av Great Inaqua í Bahama oyggjunum, og við sær hevði tað 2.600 tons av salti í lastini, sum vórðu løgd upp á Glyvrum. Saltgoymslan tekur 5-6.000 tons, so hon er bara hálvfull í løtuni.

Tað er íslendska partafelagið Hafnabakki, sum Eimskip eigur, ið hevur latið goymsluna byggja. Farið varð undir arbeiðið í summar, og goymslan stóð liðug í oktober mánaði.

Fyrsta lastin kom tó ikki til landið fyrr enn fríggjadagin. Orsøkin er, at saltið verður keypt saman við tveimum øðrum saltgoymslum í Íslandi, og tað passaði soleiðis, at nýggj last av salti ikki kom hendavegin fyrr enn nú.

Ankergracht er størsta skipið, sum hevur ligið við bryggju á Glyvrum. Tað er 130 til longdar og tekur 12.200 tons. Skipið hevur tríggjar 40-tons kranar.



*Fríggjadagin broyttist býarmyndin í Runavíkar kommunu, tá eitt 130-metra langt farmaskip lá við bryggju. Við sær hevði tað 2.600 tons av salti til nýggju saltgoymsluna hjá Eimskip*
*Mynd: Jonhard Hammer*

### Salt av Bahamas

Saltið, sum verður at fáa inni á Bakka á Glyvrum, er av Bahama oyggjunum í Karibiska havinum.

Farmaskipið, sum flytur saltið til Føroyar, leggur fyrst inn í Íslandi, har tær báðar saltgoymslurnar á Hafnafirði og í Keflavík fáa sín part av teimum 12.200 tonsunum, sum skipið tekur.

Esmar Simonsen á søludeildini hjá Eimskip sigur, at í Karibiska havinum verður heystað tríggjar ella fýra ferðir um árið, og at góðskan er av tí besta, tí sjógvurin er so reinur í økinum.

Eimskip hevur selt salt í Føroyum í eini seks ár. Saltið er komið í bingjum og selt í sekkjum. Hetta var eingin varandi loysn, men við nýggju goymsluni ber til at veita betri tænastu, heldur Esmar Simonsen.

Umframt salt hevði farmaskipið eisini ein lastbil við vippulast, sum kann vippa saltið í goymslurnar hjá kundum.

Við hesum heldur Esmar Simonsen, at Eimskip hevur fingið fótin fastan í Eysturoynni, og tað ætla tey sær at byggja víðari uppá.

Eimskip hevur eisini optión ella fyrsta rætt til at byggja eitt líknandi pakkhús beint við síðuna av nýggju saltgoymsluni, sum nú er tikin í nýtslu.

## Fuglberg komin

Nýggja rækjuskipið hjá JFK Prawns kom til Klaksvíkar beint fyri jól.

Skipið, sum hevur skift navn frá Polar Nanoq til Fuglberg, hevur verið til umbyggingar og yvirhálingar á skipasmiðjuni í Fredericia.

Fuglberg skal eftir ætlan til fiskiskap fyrst í komandi ári.



# Nýggjárskonsert við tí vit hava

**Árliga nýggjárskonsertin hjá Føroya Symfoniorkestri stendur helst fyri broytingum, og sama ger sjálvt Symfoniorkestrið møguliga eisini. Nýggjárskonsertin komandi verður eitt stig á báðum leiðum við tað, at orkestrið so at siga bert verður mannað av tónleikartum, ið eru búsitandi í Føroyum.**

NÝGGJÁRSKONSERT
*Rúnar Reistrup*

Tá Føroya Symfoniorkestur spældi ta fyrstu av teimum nú árliga afturvendandi nýggjárskonsertunum høvdu heili 14 av tónleikarunum á orkesturplássunum, ferðast til Føroya til endamálið.

Tá Symfoniorkestrið spælir nýggjárskonsert 7. januar vera bara tveir »innfluttir« tónleikarar við. Hetta er partvís av fíggjarligum ávum, tí tað er kostnaðarmikið at fáa yrkistónleikarar higar at spæla. Men orsøkin er sambært Martini Mouritsen, orkesturleiðara, eins nógv, at tíðin er um at fara frá hesum hátti at styrkja orkestrið.

– Tað er klárt, at tá vit høvdu 14 yrkistónleikarar uppi og spældu, gjørdist klangurin sera góður – allarhelst betri enn hann verður á komandi nýggjárskonsertini. Men Føroya Symfoniorkestur er á einum vegamóti. Frammanfyri stendur ein uppgerð um hvørt orkestrið skal verða verandi á tí støði, tað er á í løtuni, ella um meira orka skal leggjast í tað, soleiðis at orkestrið fær ment seg, sigur Martin Mouritsen.

Hann arbeiðir við einari ætlan um hvussu Føroya Symfoniorkestur kann menna seg til eitt slag af semi-professionellum orkestri. Dreymurin er, at tónleikararnir verða settir í parttíðarstarv hjá orkestrinum, sum so kann spæla einar hálvthundrað konsertir um árið. Hesar skulu ikki allar vera spældar av tí samlaða orkestrinum, men av ymiskum samansetingum av tónleikarum frá orkestrinum.

Í veruleikanum er her talan um eina ætlan um at gera Symfoniorkestrið til miðdepil fyri tónlistarligu menningina innan klassiskan tónleik. Men ætlanin krevur, at størri fíggjarlig orka verður veitt Symfoniorkestrinum, og enn er hetta ikki komið upp á tal.

### Mannskórið við

Á komandi nýggjárskonsert verður ikki bara Føroya Symfoniorkestur at hoyra. Sum vanligt er, er eisini kórsangur við, og hesaferð verður tað Tórshavnar Mannskór, ið fer at syngja tvey verk saman við orkestrinum.

Men hetta kann væl gerast seinastu ferð, at kór verður við á nýggjárskonsertini hjá Symfoniorkestrinum. Konsertin broytist so við og við, og Martin Mouritsen, orkesturleiðari, dylir ikki fyri, at ein av broytingunum, ið honum hevði dámt, var um Symfoniorkestrið var einsamalt um nýggjárkonsertina í framtíðini.

Nýggjárskonsertin hevur við árunum fingið síni egnu sereyðkenni, og er blivin tað, sum orkesturleiðarin kallar »okkara egna slag av nýggjárskonsert«. Sum vanligt verða ein rúgva av smærri og nokkso »løttum« stykkjum spæld, men Martin Mouritsen hevur saman við orkestrinum eisini lagt seg aftir at fáa meira klassiskan tónleik inn í spæliskránna.

Millum annað fer trompetleikarin Jóhan Hentze at spæla 2. sats av trompetkonsertini hjá Haidn, og bretin Martin Pollard, ið undirvísir á Føroya Musikskúla, fer at spæla eina lítla solo yvir temu í klaverkonsert eftir Rachmaninov. Hesin tónasmiðjurin er kendur fyri síni rættiliga krevjandi verk fyri klaver.

Av teimum lǽttaru innsløgunum vera millum annað verkið »Typewriter« hjá Leeroy Anderson, har eitt av ljóðførunum er, sum navnið boðar frá, ein skrivimaskina av tí gamla slagnum, sum bæði sigur »taktak« og »pling«, tá skrivað verður á hana.

Hetta heldur óvanliga ljóðførið verður handfarið av Steven Foggin, sum millum annað spældi upp á sandpappír á nýggjárskonsertini fyri skjótt einum ári síðan.

Nýggjárskonsertin verður framførd sunnudagin 7. januar klokkan 19.30 í Norðurlandahúsinum. Um gravgangurin eftir atgongumerkjum verður serliga stórur, verður ein eykakonsert møguliga framførd fyrr á degnum. Konsertin klokkan 19.30 verður sum vant send beinleiðis bæði í útvarpi og sjónvarpi.



*Við Føroya Symfoniorkestri á nýggjárskonsertini verða so at siga bert tónleikarar, ið eru búsitandi í Føroyum*

## Veitslufólkið bíðaði eftir kavarudding

KAVAROK
*Rúnar Reistrup*

Á Sandoynni kavaði rættiliga illa annað jólakvøld, men hóast tað, hendi einki ferðsluóhapp í oynni orsakað av hálkuni. Hetta komst partvís av, at lutfalsliga fáir bilførarar hættaðu sær út á vegirnar, eftir at kavarokið hevði lagt hesar undir eitt tjúkt lag av kava.

Summa staðni á oynni var so at siga ikki koyrandi annað jólakvøld, og av sýsluskrivstovuni varð mælt fólki til ikki at koyra, fyrr enn kavin var ruddaður burtur.

Dansur var í Virkinum Heima á Sandi, men tá dansurin skuldi enda um fýra tíðina gjáramorgunin, var kavaruddingin enn ikki komin gongd. Bussurin, sum skuldi koyra skálavíkingar heim, hættaði sær ikki avstað, fyrr enn ruddað var, og tí varð avgjørt ikki at koyra fólk úr dansihølinum, fyrr enn koyrandi var. Soleiðis sluppu fólk undan at bíða uttandura í kalda veðrinum.

Um seks tíðina var vegurin ruddaður, og tá kundi dansihølið lata hurðarnar aftur, og bussurin trygt koyra fólk heim til Skálavíkar.

# Busskoyring tálmar rúsdrekkakoyringini

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rúnar Reistrup*

Um alt landið var løgreglan úti alt týskvøldið og langt út á mikunáttina fyri at halda eftirlit við ferðsluni og dansistøðum, ið opin vóru. Og allastaðni siga løgreglustøðirnar frá friðarligum nætrum.

Hvørki í Eysturoynni, Vágunum, Sandoynni, Suðuroynni ella Havnini varð nakar tikin fyri at koyra við kenning, hóast annað jólakvøld var og fólk vóru í veitsluhýri.

Á fleiri av plássunum, har fólk hava langt til dansistøðini, verður skipað fyri busskoyring millum dansistøðini og bygdirnar í nánd, og hetta hevur sambært løgregluni á teimum ymisku plássunum gjørt, at bilferðslan eitt veitslukvøld sum annað jólakvøld er minkað burtur í nærum einki. Busskoyringin hevur soleiðis eisini havt tálmandi ávirkan á rúsdrekkakoyringina, verður sagt av fleiri løgreglustøðum.

# Kannaðu bilførarar triðja jólamorgun

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rúnar Reistrup*

Løgreglan í Havn var úti í ferðsluni triðja jólamorgun og kannaði, um bilførararnir í býnum høvdu minst til, at ein kenning frá kvøldinum fyri ofta kann halda sær til langt út á morgunin næsta dag.

Og tað vísiti seg, at hetta høvdu bilførararnir hugsað um. Í hvussu er varð eingin av kannaðu bilførarunum ávirkaður.

Sum veitslukvøld skilir annað jólakvøld seg frá øðrum veitslukvøldum við tað, at ofta er gerandisdagur dagin eftir. Við øðrum orðum fara nógv fólk frá húsum tíðliga morgunin eftir veitslukvøldið, og tá er ikki altíð, at tað, sum drukkið varð kvøldið fyri, er farið úr blóðinum.

### Raskir at rudda kava

Annað jólakvøld beyð eisini upp á heilt fitt av kava kring landið. Bilførarar hava skyldu at rudda kavan av bilinum, so at útsýnið úr bilinum er sum tað skal vera, og so at kavi ikki forðar ljósinum frá lyktunum. Verður løgreglan varug við at ein bilførari hevur sjuskað við kavaruddingini, verður hesin revsaður við bót.

Men bilførararnir í høvuðsstaðnum vóru eftir øllum at døma raskir at rudda kavan av bilum sínum gjáramorgunin, tí sambært løgregluni varð eingin bót skrivað av teirri orsøk. Hálkan um jólini var orsøk til nøkur fá smærri, men einki álvarsligt, ferðsluóhapp jóladagarnar, og nógva fólkið í býnum annað jólakvøld gjørdi lítið um seg, so jólafriðurin lá eisini yvir løgregluni í Havn hesi jólini.